

www.oljan.fo

**Jan Müller** 02 - 03 - 2013

# Oljufeløg skulu gjalda meiri skatt

Sambært útrokningum hjá stjórnini fer broytingin at geva ríkiskassanum góðar 27 milliardir krónur, og teir pengarnar hevur stjórnin gjørt av at brúka til at útbyggja jarnbreytarkervið og at keypa nýtt snartok. Í oljuvinnuni eru tey alt annað enn fegin um avgerðina hjá stjórnini at hækka skattin. -Okkara limir eru til reiðar at gera íløgur fyri upp ímóti 18 milliardum krónum, sum svarar til knappliga 3.000 arbeiðspláss, og tað eigur stjórnin at hava í huga, sigur Martin Næsby, stjóri í Olie Gas Danmark. Sambært Martin Næsby hevur Bayerngas longu boðað frá, at við tí økta skattinum heldur felagið seg ikki hava annað í at velja enn at skerja sítt virksemi í Danmark. Dong kannar málið Í Dong Energy hava tey fyrireika seg til at gera íløgur fyri knappar 15 milliardir krónur á Hejre-leiðini í Norðsjónum. -Vit fara nú at kanna, hvørjar avleiðingar ætlanin hjá stjórnini hevur fyri okkum, og hvussu hon ávirkar tær einstøku íløguætlanirnar í Norðsjónum, sigur Dong-stjórin, Henrik Poulsen, við Jyllands-Postin. Danska stjórnin hevur gjørt av, at øll oljufeløgini, sum eru virkin í tí danska partinum av Norðsjónum, skulu rinda sama skatt. Higartil hava Dong, amerikanska Hess og týsku VNG og Bayerngas rindað minni skatt enn feløgini í Dansk Undergrunds Consortioum, men nú verður skatturin javnaður, so øll rinda sama prosentpart í skatti.